gult14 cyan14 magenta14 svart14



# GÍ er yvirmannað meiri enn aðru hvørja ferð

**B36 tykist vera einasta felagið, sum roynir at miðja eftir gøtumonnum, og EB/Streymur er um at sleppa sær undan hóttanini av niðurflyting**

SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Kappingarárið er hálvrunnið, og eingin ivi er um, hvat lið hevur staðið seg best. Gøtumenn hava fult stigatal, og teir stevna miðvíst ímóti sjeynda FM heitinum. Teir vóru meistarar í 1983, 1986, 1993, 1994, 1995 og í 1996. Sjálvandi ber tað ikki til at siga, at GÍ verður meistari í ár. Tað eru framvegis níggju umfør og harvið 27 stig at spæla um, men vit kunnu í hvussu so er staðfesta, at GÍ hevur gjørt alt tað, sum tað ber til at gera fyri at gerast meistarar.

At eitt lið megnar at vinna øll stigini í fyrru kappingarhálvu er óhoyrt, síðani talið av liðum í bestu deildini í 1988 varð økt úr átta og upp í tíggju.

## Styrkirnar

Tað ber ikki til at siga annað, enn at gøtumenn hava verið sera dugnaligir. Ofta hevur verið tikið til, at teir hava ikki havt so nógv fólk. Men tað er merkisvert, at GÍ tey seinastu umførini hevur vunnið, meðan liðformaðurin, Sámal Joensen, sum tóktist vera so sera týdningarmikil, ikki hevur verið førur fyri at spæla við, tí hann er ryggskaddur, og meðan Hans Pauli Petersen, sum hevði bitið seg fastan í høgra borði, eisini hevur verið skaddur. Og so skal tað leggjast afturat, at veteranurin Magni Jarnskor ikki hevur verið førur fyri at venja, men teir hava pjøssað hann so mikið, at hann tvær tær seinastu ferðirnar hevur verið førur fyri at spæla og at gera góða nyttu.

Eingin ivi er altso um GÍ dygdirnar, og tí fer eingin at fata næsta brotið sum eina niðurgerðing av GÍ dygdunum. Men tað er merkisvert, at mótstøðuliðini hjá GÍ í miðal meiri enn aðru hvørja ferð hava verið undirmannað, tá dysturin hevur verið liðugur, meðan gøtumenn hvørja ferð hava verið fullmannaðir alla tíðina.

Tað eru ivaleyst fleiri áskoðanir um, hví hetta hevur verið so, og tað eru ivaleyst fleiri orsakir til henda veruleikan. Ein uppløgd orsøk kann vera, at Gí spælararnir eru í betri venjing enn nógvir av mótstøðumonnunum, og ein onnur kann vera, at fleiri av spælarunum hjá oddaliðnum eru meiri royndir, enn nógvir av mótstøðumonnunum eru. At gøtumenn duga alt tað á einum vølli, sum flestu spælarar duga er eingin loyna, men í ár hava teir verið sera disiplineraðir. Í hvussu so er hava dómarar og hjálpardómarar sæð tað soleiðis!


*Sandoyingar endaðu dystin móti GÍ við átta monnum, og yvirhøvur tykist hetta at gerast vanlig mannagongd hjá GÍ*

## Reyðu kortini

Í fyrsta umfarinum var støðan 1–0 til GÍ, tá Jan Joensen hjá KÍ varð rikin av vøllinum. GÍ vann 2–1 í Klaksvík.

Í næsta umfarinum var støðan 2–0 til GÍ, tá Soran Anghel varð rikin av vøllinum. GÍ vann á heimavølli 4–0 ímóti EB/Streymi.

Í triðja umfarinum vann GÍ 3–2 ímóti HB liði, sum allar 90 minuttirnar var fullmannað í Gundadali, men í fjórða umfarinum var ostaskorpan aftur á lofti. B36 vitjaði í Gøtu, og Arnbjørn Danielsen sá reyða kortið, tá ein tími var farin. Tá var støðan 2–0, og GÍ tóktist ikki fáa serligan fyrimun av útvísingini, tí endaliga úrslitið gjørdist 3–1.

Í fimta umfarinum vann GÍ 4–1 á útivølli ímóti VB, sum alla tíðina hevði ellivu spælarar á vøllinum. Í sætta umfarinum vórðu vágamenn sendir vestur aftur við 8–2 tapi í viðførinum. Støðan var 4–1, tá Kim Poulsen í 39. minutti sá reytt.

Í sjeynda umfarinum var GÍ á stevnu í Runavík. Støðan var 1–0 til GÍ, tá Djóni N. Joensen sá reytt. Tað var í 35. minutti. GÍ vann 2–1. Sigursmálið fingu teir í síðsta minutti. Í áttanda umfarinum vóru ellivu B68 spælarar alla tíðina á nýggja vøllinum í Serpigerði. GÍ vann 2–0.

Aðra staðni í blaðnum í dag er greitt frá, hvussu tað gekst sandoyingum, tá GÍ sunnudagin var har suðuri og vann 7–0. Telja vit saman, so eru sjey spælarar útvístir í níggju dystum ímóti GÍ (og ein er rýmdur!).

Klaksvíkingar eru illa sperdir, tá teir komandi fríggjakvøld fara til Gøtu. Dysturin er framskundaður, tí Sámal Joensen hevur bjóðað liðfeløgunum í brúdleyp leygarkvøldið. Hagtølini omanfyri siga, at tað er rættuliga sannlíkt, at onkur KÍ spælari fer at fáa reytt kort fríggjakvøldið. Tað hevði ikki verið so gott hjá KÍ, tí reytt kort í 10. umfarinum fer at hava við sær, at spælarin verður leikbannaður í steypafinaluni, sum verður á ólavsøku.

## B36 fylgir við

Toppdysturin hetta vikuskiftið var í Gundadali. B36 vann 3–2 á VB, og harvið staðfestu teir í árstalsfelagnum, at í løtuni eru teir einasta veruliga boðið upp á avbjóðara hjá GÍ. Munurin ímillum oddaliðini er fimm stig. Tað ljóðar av nógvum, og tað er nógv. Um mett verður út frá gongdini nógvu tey seinastu umførini, so kann roknast við, at GÍ og B36 fara at vinna hvørja ferð. Um tey gera tað, so verður talan um sannan lagnudyst, tá GÍ sunnudagin 19. august í trettanda umfarinum fer at spæla ímóti B36 í Gundadali.

Um GÍ hevur vunnið hvørja ferð inntil tá, og um teir vinna ta ferðina, so er møguleiki fyri, at FM heitið verður so tíðliga plaserað í ár, sum tað ongantíð hevur verið áður. Men nú fáa vit at síggja. Í B36 og í hinum feløgunum kunnu tey troysta seg við, at GÍ skal luttaka í Europa Cup. Tað skulu teir í B36 ikki.


*B36 staðfesti seg aftur hesa ferð sum einasti veruligi avbjóðarin hjá GÍ*

## Bronsuplássið

GÍ er langt burtur, og B36 tykist eisini fjart hjá hinum feløgunum. Tí stendur kappingin hjá teimum í fyrstu atløgu fyrst og fremst um bronsuplássið. VB kiksaði tvær ferðir fyrstu løtuna ímóti B36, og tað megnaðu teir ikki at vinna á aftur. Vágbingar skulu luttaka í Europa Cup, og fyribils mugu vit siga, at teir eru dotnir úr kappingini um tey bæði fremstu plássini.

HB kom við sigrinum í Miðvági aftur á triðja plássið, men teir hava á pappírinum torførari uppgávu á skránni hesa ferð, enn vágbingar hava. VB skal spæla í Miðvági, meðan HB skal spæla á Svangaskarði. B68 sigurin á KÍ bar við sær, at toftamenn við sigri á HB kunnu halda summarfrí á fjórða plássi.

KÍ og NSÍ eru sera óstøðug. KÍ tykist í løtuni ikki at hava styrki til at blanda seg í stríðið um heiðursmerkir. Í fýra dystum hava teir málmunin 2–14. Tað man ikki vera komið ofta fyri áður. Við gongdini seinastu vikurnar í huga tykjast avbjóðingarnar tríggjar tær næstu ferðirnar ógvusligar. KÍ skal spæla í Gøtu fríggjakvøldið, so skulu teir spæla steypafinalu ímóti B36 á ólavsøku, og í fyrsta umfarinum eftir summarsteðgin er HB í Gundadali á skránni. Men hóast gongdin í landskappingini ikki er góð, so fer sigur í steypafinaluni at hava alstóran týdning fyri hetta kappingarárið. Sjálvandi verður B36 stórfavorittur, men bæði í B36 og í KÍ vita tey, at ein steypafinala er nakað heilt serligt.

NSÍ er sum altíð sera óstøðugt. Hesa ferð taptu teir á Eiði. Ofta hava teir gjørt ein vørr í Gundadali. Sunnudagin skulu teir vitja B36. Gongdin seinastu vikurnar bendir ikki á, at NSÍ hesa ferð fer at megna nakað í Gundadali, men, sum sagt, teir eru óstøðugir.

## EB/Streymur dregur frá

Undan kappingarbyrjan varð EB/Streymur mett sum niðurflytingarevni. Gongdin tær seinastu vikurnar hevur víst, at EB/Streymur hevur megi at standa seg betri í bestu deildini hesa ferð, enn teir gjørdu, tá teir i 1993 beinanvegin fluttu niður aftur.

Sunnudagin fingu teir á Mølini fyri fyrstu ferð í ár stig á heimavølli. Komandi vikuskifti kemur eitt B71 lið, sum er illa fyri, norður til Eiðis. Tá verður tað ivaleyst luturin hjá EB-/Streymi at mynda spælið. Tað verður øðrvísi, enn tá teir lúra eftir møguleikanum at fara í snarálop. Men EB/Streymur verður undan tí dystinum – og fyri fyrstu ferð í ár – roknað sum favorittur. Um EB/Streymur fær trý stig ímóti B71 verður tað greitt, at niðurflytingin og kvalifikatiónin verður ein spurningur ímillum sandoyingar og vágamenn.

Á Sandi stendur einki serligt til. Eli Hentze er skaddur, Kári Nielsen hevur brotið beinið, og tá teir fara til Eiðis eru tríggir spælarar leikbannaðir – Jógvan Jón Petersen, Jón Brekku og Bjørn Thorsteinsson.

Á støðutalvuni er FS Vágar niðast, men B71 er bara eitt stig undan vágamonnum. Vit hava í fleiri vikur sagt, at tað eru ábendingar um, at í FSV gongur tað rætta vegin. Hesa ferð megnaðu teir ein málleysan hálvleik ímóti HB, men enn tykist tað resta nógv í, áðrenn teir fara at megna at fáa stig. Stóra slagið verður 11. august, tá B71 fer vestur til Miðvágs.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



B36 – Sumba 2-1 (0-1)

# B36 vendi dystinum

**Eftir at sumbingar vóru frammanfyri við steðgin, vendi B36 dystinum á høvdið við tveimum málum. B36 er nú aftur oddalið, meðan sumbingar fáa torført við at vinna sæti í bestu deildini**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

B36 vann landskappingardystin á niðurflytarunum úr Sumba leygardagin. Sigurin var sum heild uppiborin, tá hugt verður eftir reinum málmøguleikum, tí heimaliðið hevði fleiri av tí slagnum.

Við tveimum sigrum á rað er B36 við aftur í oddastríðnum, har trý lið nú liggja lið um lið. Sumbingar eru hinvegin fýra stig frá oddasessinum, og tað verður torført hjá teimum at endurvinna plássið í bestu deildini, nú teir hava tapt tveir teir seinastu dystirnar.

## Sumba betri byrjan

Tað vóru annars sumbingar, ið vóru skjótari úr startblokkinum. Tað fyrsta álopið í dystinum endaði við máli til Sumba. B36 verjan beinir bóltin úr verjuni niðan á miðjuna, har sumbingar vinna bóltin. Teir gera skjótt av, og Nebojsa Veljkovic verður spældur leysur. Hann sendir framvið málverjanum fyrstu ferð. Bara heilt fáir minuttir eru spældir, og Sumba er frammanfyri. Stór frøi var á teimum sumbingum, ið høvdu leitað sær til Havnar.

B36 verjan var ikki rættiliga raknað við, tá málið varð skotið, og tað kom heimaliðnum dátt við.

Sumba hevði takið á dystinum fyrstu minuttirnar, men síðani menti heimaliðið seg. Sum hálvleikurin leið var tað alt meira B36, ið stýrdi hendingunum á vøllinum. B36 spældi seg eisini fram til nakrar stórar málmøguleikar, men hesir vórðu misnýttir.

## Dysturin vendir

Eftir steðgin helt B36 fram við at trýsta sumbingar aftur á vøllin. Sumbingar stóðu tó stinnir, og B36 hevði torført við bróta ígjøgnum verjuna.

Miðskeiðis í hálvleikinum eydnaðist at fáa útjavnandi málið. Heini í Skorini fekk eina sending úr verjuni frá Finn Mørk. Framherjin er staddur beint uttanfyri brotsteigin í vinstra borði, og hann dregur síðani tvørturum, framvið fleiri verjuleikarum hjá Sumba og setir bóltin í netið.

Hetta gav B36 blóð á tonna, og teir hildu fram við at trýsta. Stutt eftir fyrra málið skýtur Øssur Jacobsen vinnandi málið. Eftir hornaspark fær hann fatur á einum bólti beint uttanfyri málteigin. Hann snýtur verjuna og trillar róliga bóltin í netið.

Hetta var avgerandi málið, og B36 megnaði at halda fast um øll trý stigini, og tað setir havnarliðið í eina góða støðu á stigatalvuni.

Sumba gjørdi tó ein vørr móti endanum av dystinum, sum kundi givið mál. Í tíðini, sum dómarin hevur lagt afturat, fær Sumba hornaspark. Bólturin verður beindur útfrá, har Jan Poulsen fær fatur á honum. Jan ger seg til at skjóta, men snýtir ístaðin B36-spælarar, sum storma út ímóti. Jan dettur í vøllin, og sumbingar vilja hava brotsspark, men dómarin letur ikki við seg koma og bríkslar ístaðin dystin av.

**B36 – Sumba 2-1 (0-1)**
0-1: Nebojsa Veljkovic
1-1: Heini í Skorini
2-1: Øssur Jacobsen

GÍ-LÍF 3-3 (0-1):

# Málríkt í Gøtu

**Tey bæði niðastu liðini býttu málini javnt ímillum sín leygardagin, og sostatt er eingin broyting í botninum**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Sum onnur deild í ár tykist at hætta sær, so eru øll uttan GÍ og LÍF við í kappingini um heiðurskrónurnar.

Leygardagin hittust hesi bæði liðini í Gøtu, og úrslitið sum so gav onga ábending um, hvat av liðunum helst noyðist tungu gongdina niður í aðru deild komandi kappingarár.

Talan gjørdist um ein málríkan javnleik, og ivaleyst munnu vertirnir vera best nøgdir um hendan, tí tað var alla tíðna LÍF, sum hevði leiðsluna í dystinum, tó at GÍ av og á megnaði at stríða seg upp á javnt.

## Mugu vinna

Við javnleikinum verður nú heldur torført hjá gøtumonnum at síggja, hvaðani neyðugu stigini til bjargingina skulu koma. Higartil hevur talan bert verið um hin eina sigurin – tann móti B36 – og spurningurin er, hvørjum liðum GÍ kann rokna við at taka nakað frá. Í øllum førum um mett verður eftir úrslitunum í fyrru hálvu.

Gøtumenn eru tó kendir fyri sítt treiskni, og tað kann eisini væl hugsast, at teir kortini fara at skava somikið saman, at talan kortini verður um longda tilveru í næstbestu deildini.

**GÍ-LÍF 3-3 (0-1)**
0-1: Sigfríður Olsen
0-2: Tomek Resel
1-2: Páll Rói Poulsen
2-2: Meinhard Joensen
2-3: Fróði Joensen
3-3: Áslakur Nesá

ÍF-HB 4-2 (3-0)

# Ferð á ÍF

**Fuglfirðingar hildu varmakeldu við at senda HB til hús við einum tapi**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Eftir eina sera laka byrjan upp á kappingarárið er nú líkt til, at fuglfirðingar veruliga hava fingið ferð á stigasavnanina.

Á varmakeldustevnuni um vikuskiftið var oddaliðið, HB, á vitjan, men teir noyddist sørir heimaftur.

## Gjørdu skjótt av

Avgerðin í dystinum fall innan nakrar fáar minuttir í fyrra hálvleiki. Fuglfirðingar skoraðu tá trý mál á rað, og hetta var meira enn havnarmenninir megnaðu at vinna innaftur.

Fyrst var tað Eyðolvur Petersen, sum tvær ferðir snýtti Kaj Leo Johannesen úr stórari fjarstøðu. Fyrst við einum beinleiðis frísparki, og síðani við einum fúkandi langskoti.

Løtu seinni átti Jan Jørgensen seinasta fótin á eftir hornaspark, og dysturin tóktist tá eisini mest sum avgjørdur.

Tað var eisini í lagi, at fuglfirðingarnir høvdu eina greiða leiðslu í hálvleikinum. Teir vóru oman á í so at siga øllum, og tað var sjáldan, at HB somikið sum nærkaðist málinum.

Alt hetta var tó broytt, tá liðini komu út til seinna hálvleik. HB hevði nú veruliga mannað seg upp. Teir vunnu brádliga fleiri bóltar, løgdu trýst á ÍF verjuna, og tað var eisini skjótt, at Danny Rasmussen hevði minkað um munin tá hann stútaði innlegg í kassan.

HB helt á við málsókna spælinum, men brádliga svaraði ÍF aftur, tá Bárður á Lakjuni setti í málið úr stuttari fjarstøðu.

HB fekk eitt mál afturat, tá Bogi Midjord royndi seg úti frá, men hetta var ov seint og ov lítið til at fáa nakran spenning í aftur dystin.

ÍF er nú í hølunum á HB, sum saman við Skála og B36, er í oddinum, og við gongdini seinastu vikurnar í huganum, er als ikki óhugsandi, at fuglfirðingar nú kortini kunnu seta seg á sessin, sum gevur beinleiðis atgongd til bestu deildina.


*Á myndini eru tað fuglfiriðingar, sum fáa kærleikan at kenna, men yvirhøvur vóru teir kortini omaná, tá HB vitjaði á varmakeldu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**ÍF-HB 4-2 (3-0)**
1-0: Eyðolvur Petersen
2-0: Eyðolvur Petersen
3-0: Jan Jørgensen
3-1: Danny Rasmussen
4-1: Bárður á Lakjuni
4-2: Bogi Midjord

# Renning á varmakeldu



*Hesar tríggjar vóru fremstar í kappingini fyri gentur í skúlaaldri*

Í samband við varmakelduna varð skipað fyri rennikapping í Fuglafirði leygardagin 30. juni.

Tey vaksnu runnu 5 km, meðan børn í skúlaaldri runnu 1 km, og børn undir skúlaaldur runnu 500 m.

Umstøðurnar at renna vóru góðar, hóast tað smáregnaði.

Kappingina hjá kvinnum vann Sunnuvá Bjarnastein úr Bragdinum við tíðini 19,45 min. Nummar tvey gjørdist Ása Poulsen ú Havn við tíðini 23,46 min, meðan Maria í Skorini Jacobsen úr Treystinum gjørdist nummar trý við tíðini 23,52 min.

Guttorm Sørensen úr Treystinum vann kappingina hjá monnum við tíðini 16,30 min. Sigurð Justinussen úr Bragdinum bleiv nummar tvey við 17,41 min. Nummar trý bleiv Cecil Weihe úr Bragdinum við tíðini 17,46 min.

Sum sæst á tíðunum hjá Sigurð og Cecil, vóru teir, eins og higartil í ár, rættiliga javnir. Teir fylgdust allan vegin, men Sigurð dróg longsta stráðið á síðsta kilometrinum.

## Úrslit:

**Gentur undir skúlaaldur - 500 m**
1. Gunnvá Justinussen Glyvrar 7 ár 1,52 min
2. Gunnrið Fríða Joensen Klaksvík 6 ár 2,47 min

**Dreingir undir skúlaaldur - 500 m**
1. John Viljam Johannesen Klaksvík 6 ár 1,45 min
2. Jósvein Joensen Klaksvík 4 ár 2,07 min
3. Beinir Johannesen Klaksvík 4 ár 2,58 min

**Gentur í skúlaaldri til og við 12 ár - 1 km**
1. Helga Djurhuus Hoyvík 12 ár 3,41 min
2. Karina Hansen Klaksvík 12 ár 4,22 min
3. Alexandrina Jacobsen Klaksvík 11 ár 4,38 min
4. Vár Gregersen Sandavág 8 ár 5,07 min
5. Vilbjørg Johannesen Klaksvík 9 ár 5,10 min
6. Tanja Sørensen Hvannasund 7 ár5,33min
7. Guðrið Justinussen Bragdið 8 ár 5,47 min

**Dreingir í skúlaaldri til og við 12 ár - 1 km**
1. Jón Gregersen Sandavág 12 ár 3,37 min
2. Jan Elmar Sørensen Treysti 9 ár 3,57 min
3. Tummas Justinussen Bragdið 11 ár 4,19 min
4. Fróði Gregersen Sanda vág 10 ár 4,37 min
5. Teitur Hansen Treysti 9 ár 4,56 min

**Kvinnur - 5 km**
1. Sunnuvá Bjarnastein Bragdið 1968 19,45 min
2. Ása Poulsen Tórshavn 1979 23,46 min
3. Maria í Skorini Jacobsen Treysti 1987 23,52 min
4. Brindis R. Weihe Bragdið 1968 24,31 min

**Menn - 5 km**
1. Guttorm Sørensen Treysti 1968 16,30 min
2. Sigurð Justinussen Bragdið 1967 17,41 min
3. Cecil Weihe Bragdið 1965 17,46 min
4. Bogi Joensen Treysti 1968 18,22 min
5. Niels Jákup Jakobsen Bragdið 1963 18,43 min
6. Sølvi R. Hansen Roysnið 1970 18,45 min